# BØNARLØTAN

**DESEMBER** **2025** **40. árg.**

## *1. Mánadagur* *1. Tim. 4.1-16*



*Kaffi eftir møti í samkomuni.*

### JAPAN
### Shino og Hallur Mortensen
### Kano 16, Nana 14, Louie 12, Rio 6

Nýggjar kvinnur koma nú í *Mama Café* hjá Shino, har hon lutar evangeliið miðvíst. Í des. hava vit fleiri jólatiltøk. Hvørt ár leggjast fleiri aftrat, ið ikki koma regluliga. Biðið, at evangeliið verður boðað greitt, og at fólk finna Jesus sum sín frelsara.

### KRINGVARPIÐ

7. des. útvarpsmøti, Ebenezer, Tórshavn
21. des. sjónvarpsmøti, Betesda, Klaksvík

**EVANGELISKA RØDDIN á ras2.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv......... kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv. kl. 21)
Týskv............ kl. 21 Á torginum (endursent sunnud. kl. 12.30)

## *2. Týsdagur* *Zak. 5.1-11*



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

5. og 6. des. savnast 9-12 børn og ung aftur í samkomuni til vikuskifti við undirvísing og hugna. Evnið er *Pílagrímsferðin*. Síðst komu tey til krossin; nú verður tað um lívið sum trúgvandi, um mótgongd og um herklæði Guds. Biðið, at børnini skilja evangeliið og hava Jesus við í lívinum.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## *3. Mikudagur* *1. Tim. 5.1-25*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 13, Emma 9**

6. og 21. des. hava vit serlig jólamøtir. Jólaaftan verða vit saman við einligum familjum og einstaklingum í samkomuni *La Fonte*.

**ZAREPTA**
Vetrarlegur, Suðuroy 9.-11. jan.

## 4. Hósdagur — Sálm. 78.1-31

**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Biðið fyri heilsu okkara. Eg livi ikki so væl sum er og havi verið til fleiri kanningar. Anne hevur pínu í knænum og brúkar høkjur. Vit verða í Føroyum allan des. og fara eftir tørvi at samskifta gjøgnum ZOOM við fólk í Danmark.

**FØROYAR**
**Birita og Petur á Roykheyggi**
Vit hava vitjað samkomur bæði uttanlands og heima, vitjað fólk og verið í Zarepta. Heimasíðan www.ordguds.fo er gjørd, og vit leggja tilfar út á Spotify og aðrar stroymingtænastur undir heitinum *Hvat lærir orð Guds?* Vit halda fram at vitja fólk og samkomur og leggja tilfar út á netið, og ætlanin er eisini at hava ein mannfólkadag í des. Takk fyri bøn og annan stuðul. Vit biðja, at Harrin signar verkið.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Samuel 11**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 14**

## 5. Fríggjadagur — Zak. 6.1-15

**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**



Orgulkonsert verður 7. des., jólakonsert 14. des., jólaveitslur fyri fólk við breki 13. og 16. des., og jólaaftan hava vit trý møtir, sum altíð eru

serliga væl vitjað. Minnist serliga John og hini, ið luttaka á møtunum og tiltøkunum. Biðið, at Harrin virkar, og at nógv venda sær til Hansara.



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *6. Leygardagur* — *1. Tim. 6.1-21*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**

Vit takka fyri allan stuðul eftir hálvttriðja ár á Malta, nú vit fara víðari við evangeliinum í nýggjari danskari samkomu. Her er so stórur tørvur í Danmark. Biðið fyri hesum.



**Anna og Hans Djurhuus**

Føroyskt møti verður leygard. 6. des. kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2B í Aalborg. Biðið fyri hesum seinasta møtinum í árinum.

## *7. Sunnudagur* — *Zak. 7.1-14*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 15, Leah 12, Abigail 7**

Við ársenda takka vit Gudi fyri Hansara trúfesti. Í dag verða tvær ungar kvinnur doyptar. Biðið fyri teimum og fyri fongsulsmøtinum,

sum vit hava 9. des. Helst koma nógvir menn. Jólamøti verður jólaaftan. Tað er ein góð og hugnalig løta fyri familjurnar.

## *8. Mánadagur* *2. Tim. 1.1-18*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Í dag endar stráluviðgerðin hjá Peter fyri krabba. Biðið um grøðing og um vísdóm, nú vit fyrireika okkum til 2026. Vit fara til Papua Ný Guinea í jan. Takk fyri forbønir og stuðul í 2025.



**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg**
**Andrea 5, Boas 3, Jóanes 0**

**Susan og Øssur Berghamar**

Nú jólini nærkast, hugsa vit um eldri útisetar, ið búgva her á leið. Mikud. 10. des. kl. 12.30 verður seniorsamkoma í Kristnastovu. Hetta er ein hugnasamkoma fyri føroyingar, ið vit hava havt samband við gjøgnum farin ár. Hugsa tit um onkran, sum vit kunnu bjóða við, so latið okkum vita. berghamar@kristnastova.dk

## *9. Týsdagur* *Zak. 8.1-23*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 5, Selah Rose 2**

Vit fyrireika okkum til fyrstu mál- og mentanarroyndina, ið verður 9.-12. des. Tað verður ein sera góð hjálp at síggja, hvørji øki vit skulu raðfesta í sambandi við asmatmálið og -mentanina. Biðið, at Gud sendir samstarvsfelagar at gera hetta arbeiðið saman við.

## *10. Mikudagur* *2. Tim. 2.1-26*

**NTM – FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 10, Natan 7**
Tilmelding og kunning um *Reach 2026* er opin á www.ntm.fo. Evnið hesa ferð er: *Tí so elskaði Gud...* Minnist Remi R. Rasmussen, sum er í trúboðaravenjing á North Cotes College.

## *11. Hósdagur* *Sálm. 78.32-72*

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**
Vit takka Gudi fyri trúfesti og varðveitslu. Takk, at tit biðja fyri boðanini av orði Guds og fyri, at menniskju koma til trúgv og leggjast aftrat samkomuni.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**

## *12. Fríggjadagur* *Zak. 9.1-17*

**ONGLAND, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 17, Lydia 15**
Vit kunnu nú saman við fleiri trúboðarafelagsskapum arbeiða fyri at útvega stuðul. Biðið um vísdóm, og at vit í øllum eina líta á Gud.



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna Rodda**

*Í dag fyllir Noah Kristian Joensen 12 ár

## *13. Leygardagur* *2. Tim. 3.1-17*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Lesi Pílagrímsferðina nú enn eina ferð. Tað er so satt, sum vit mangan lesa har, at *Kongurin sendir á okkara veg, hjálp og mangt troystandi orð,* NSGF nr.1259. Vit takka Gudi fyri hjálpina, fólk á staðnum hava veitt og veita okkum: Aqqu, Brynhild og Lasse, Jan og Bjørg, René og Kasper.

**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Sunnudagur* *Zak. 10.1-12*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 8**

Samkoman er í vøkstri, og fólk taka nýggj trúarstig. Leiðslan arbeiðir við visjónstilgongd fyri kós og framtíð. Biðið um Guds vísdóm og Andans leiðslu.

## *15. Mánadagur* *2. Tim. 4.1-22*

**FØROYAR**
**Unn og Jógvan Zachariassen**

700 góvu sítt lív til Harran Jesus á Billy Graham møtunum, sum eg leiddi í Tallinn í Estlandi. Uppfylgingararbeiðið er byrjað, har

vit syrgja fyri, at øll koma inn í lokalar samkomur, so tey kunnu vaksa og búnast. Takk, at tit biðja fyri okkara familju.

**– Elin og Jógvan Jacobsen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Anna og Óli Steinberg**
**– Maria og Jens Bech**



*Í dag fyllir Louie Mortensen 12 ár

## *16. Týsdagur* — *Zak. 11.1-17*

**Atlantic Mission**
Básurin á samfelagsstevnuni við Tjarnir virkaði væl. Vit samtalaðu við mong; nøkur vildu hoyra evangeliið, øðrum tørvaði frelsuvissu. Eisini vildu fleiri hoyra um venjing og vera við til at vitna og boða evangeliið í Føroyum. Biðið Harran leiða og signa øll hesi. Biðið um vísdóm, so at Harrin leiðir, nú vit leggja venjingar og annað til rættis.

## *17. Mikudagur* — *1. Pæt. 1.1-25*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 16, Markus 13, Evita 10, Joy 8**
Biðið fyri friði í okkara býi. Kartellini volda ófrið, og nógv kenna seg ótrygg. Biðið, at hetta gevur evangeliinum størri framgongd.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## 18. Hósdagur *Sálm. 79*



**MEKSIKO**
**Isabel og Edy Mora**
**Marianna 0**

Takk, at vit sum nýggj trúboðarahjún fáa pláss í Bønarløtuni! Vit hava fimm evangeliskar bíbliutímar um vikuna í ymiskum heimum. Mikukv. møtast vit heima hjá okkum. Sunnud. fara vit á møti í Ciudad Hidalgo, har Michael Clark hevur stovnað samkomu. Alma, ein nýggj trúgvandi, og sonurin Brandon koma við tá. Biðið fyri teimum.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 12, Micah 12**

## 19. Fríggjadagur *Zak. 12.1-14*



**TURKALAND, Istanbul (fj.arb.)**
**Annika og Stephen Everett**

35 trúgvandi luttóku á stevnu um *The Good News and Effective Follow-Up*, sum er partur av at venja nýggjar leiðarar í turkisku samkomuni. Nógvir trúboðarar og pastorar eru vístir úr landinum, so samkomunum tørvar nýggjar leiðarar. Átta trúgvandi í Eysturturkalandi vórðu doypt herfyri, summi teirra verða forfylgd av familjum sínum. Biðið fyri trúgv teirra og arbeiðnum í samkomuni. Harrin virkar í Turkalandi. Møguleikar eru at bera boðskapin, markirnar eru hvítar, sálir eru til reiðar. *Matt. 9:37-38.*

*Í dag fyllir Leah Mortensen 12 ár

## *20. Leygardagur* *1. Pæt. 2.1-25*

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 8, Timon 6, Manuel 1, Salome 1**

Vit fara á bíbliutýðingarverkstovu saman við tveimum kovolmonnum henda mánaðin. Kovolfólkini hava tosað um tað í yvir ein mánað og eru spent um hetta næsta stigið.

## *21. Sunnudagur* *Zak. 13.1-9*



**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**

Biðið fyri møtum, samtalum og verki okkara á netinum. STEVN er nú endaliga umsett til enskt og skal í næstum umsetast til urdu (pakistanskt), sum er sama málið, ið verður tosað í India (hindi). Hetta verður gjørt í Pakistan. Síðani skulu upptøkur gerast og programmið leggjast út.



**– Birgit og Svenning av Lofti**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 13, Petra 11**

*Í dag fyllir Andrea Norðberg 6 ár

## *22. Mánadagur* *1. Pæt. 3.1-22*



**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 14**

Stórur tørvur er á fleiri trúboðarum í Papua Nýguinea. Nógvar hurðar eru opnar fyri evangeliinum í fleiri ættarbólkum, ið bjóða trúboðarum at koma. Biðið fyri ungu týsku familjuni Bergen. Tey hava bíðað leingi eftir innfarar- og arbeiðsloyvi. Vit biðja, at tey nógvu ungu, ið tæna Harranum úti í heimi, verða til signing og vaksa andaliga.

**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

*Í dag fyllir Zephaniah Hansen 6 ár

## *23. Týsdagur* *Zak. 14.1-21*



**OM, SUÐURAFRIKA,**
**OM REACH**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 2**

Næmingarnir verða lidnir í des. Summir fara í missión til onnur lond, onnur ætla at lesa víðari. Vit hava frí, inntil næsta toymi byrjar í jan./feb. Tanja bíðar enn eftir úrslitinum av kæruni í sambandi við visumið.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

## *24. Jólaaftan* *1. Pæt. 4.1-19*




**OM Føroyar,**
**Margareth Djurhuus**
**LOGOS HOPE, TeenStreet**

Vit takka Gudi fyri leiðslu og vegleiðing, eins og vit takka fyri øll, ið hava tænt og luttikið gjøgnum skipatænastuna, TeenStreet ella aðrar OM-tænastur. Tey vóru við til at mynda livandi samfeløg av Jesu eftirfylgjarum millum tey minst náddu. Toymið her heima við sjálvbodnum byrjar at mennast, og fleiri vilja hjálpa til í ymiskum uppgávum.

Biðið, at Gud leiðir og verður miðdepil í hesi tilgongdini, og at vit gera Hansara vilja. Takk fyri allan stuðul gjøgnum bøn, við praktiskari hjálp og við fíggjarligum stuðuli. Vit biðja framvegis um Guds leiðslu í øllum *Inntil øll hava hoyrt*. Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum vælsignað nýggjár.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 17, Noah 16, Karis 12,**
**Judah 10, Ethan 8**

**PAPUA NÝGUINEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 9, Jude 7, Evelyn 5, Olivia 2**

## *25. Jóladagur* *Luk. 2.1-24*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg verði í Dakar inntil um hálvan des. Eg skal til onkran fund og eitt skeið. Dóm. og 2. Sám. eru nú prentaðar, og eg geri 1. og 2.

Kong. klárar at senda til umsetingarráðgevan. Bíbliutími er eina ferð um vikuna í Tongia, og fólk koma trúføst.

## *26. 2. jóladagur* *Luk. 2.25-52*



**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 16**

Gistingarhúsið hjá okkum í Dakar er ein gamal bygningur, ið tørvar ábøtur. Síðst í des. kemur eitt toymi úr Týsklandi at dagføra tað elektriska í bygninginum. Vit eru nýliga flutt í størri íbúð, ið liggur væl fyri. Biðið, at vit falla væl til í nýggja grannalagnum. Val verður í Guinea 28. des., so vit fara ikki hagar um jólini og ársskiftið. Biðið, at valið fer friðarliga fram, og at vit kunnu gera túrin seinni.

## *27. Leygardagur* *Nah. 1.1-14*

**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Eg takki Gudi, at eg eri komin trygt aftur til Meksiko eftir ein mánað í Skotlandi. Biðið fyri mær og toyminum, sum vit halda fram at endurskoða Jóh. ev. og 2. Kor.

## *28. Sunnudagur* *1. Pæt. 5.1-14*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

Stevnan í Norðurírlandi saman við á leið 50 ungum var sera stimbrandi. Minnist tey, sum tey søkja Harran viðvíkjandi leiðslu í sínum lívi. Vit undirvísa stundum í ymiskum førleikum, so sum matgerð, tøkni og mentan. Hetta dámar bæði næmingum og

lærarum væl. Biðið, at vit fram til juli fáa fleiri starvsfólk til barnaansingina.

**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 17**



**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

## *29. Mánadagur* *Nah. 2.1-14*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 13, Noah Kristian 11**

Vit eru takksom fyri árið, ið fer, og at Gud hevur virkað í lívi okkara og í tænastuni í *The Well International*. Vit og starvsfelagar okkara leggja ætlanir fyri 2026. Biðið um vísdóm og einleika, og at Harrin leiðir, signar og opnar hurðar eftir vilja Sínum. Takk, at tit standa saman við okkum í bøn.

## *30. Týsdagur* *2. Jóh. 1-13*

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Takk fyri tíðina saman við samkomum og vinum heima í Føroyum. Yvirafturkomin hevur Nuri havt úr at gera við at fyrireika fundarskráir og netstevnur, umframt skrivstovuarbeiði, ið liggur á láni. Um jóltíðir eru altíð nógvar bøkur, ið skulu prentast og sendast til ymisku ættarbólkarnar. Gamli bíbliuskúlin varð seldur í summar, og nú vilja vit keypa nýggj høli. Gleðilig jól og gott nýggjár til tykkum øll!



| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## *31. Nýggjársaftan* — *Nah. 3.1-19*

### RÁÐGEVARI MÍN 2026 – 90. árgangur

Victor Danielsen gav út fyrsta árg. í 1937. Sonurin Dánjal tók yvir í 1962, og frá 2002 hava Victor Dánjalsson og konan Gunnleyg Kallsberg staðið fyri útgávuni. *Ráðgevari mín* kostar 50 kr. og fæst hjá Victor, 230211 og í bókabúðum. *Ráðgevarin* hevur eitt orð úr Bíbliuni til hvønn dag. Góð jólagáva og nýggjársheilsan!




### NÝGGJ BÓK!
### GUDAKAPPINGIN
### 40 síður   130 kr.




Sanna søgan um Elias, Jesus og heimsins størsta sigur. Tú kennir ivaleyst nógvar ymiskar kappingar. Henda søgan snýr seg um eina heilt serliga kapping.
Arni Zachariassen týddi.

### BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope!

# GOTT NÝGGJÁR!

***Frið Mín gevi Eg tykkum. Jóh. 14.27***

FORLAGIÐ LEIRKERIÐ

Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo